gult cyan magenta svart



# Vinnuhúsið: Runavík eitt gott stað at leggja útgerðarhavnina

**– Fjarstøða ímillum vinnuvirkini og útgerðarhavnina hevur nakað at siga. Og í so máta liggur Runavík væl fyri, sigur Vinnuhúsið**

ÚTGERÐARHAVN
*Áki Bertholdsen*

– Skal vinnulívið í Føroyum fáa størst møguligt gagn av eini oljuútgerðarhavn, skal hon helst liggja væl fyri hjá so nógvum virkjum sum gjørligt.

Tað sigur Vinnuhúsið í eini viðmerking til, at Runavík vann kappingina um at blíva føroysk oljuútgerðarhavn.

Tað var seinasta hósdag, at avgerðin fall, sum bíðað hevur verið eftir við spenningi. Tá varð tað gjørt av, hvar oljuútgerðarhavnin skal verða og Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum heldur til í Vinnuhúsinum, ynskir Atlantic Supply Base, Skipafelagnum og Runavíkar kommunu tillukku.

Á heimasíðu síni sigur Vinnuhúsið, at verður hugt eftir, hvussu føroyska vinnan er spjadd um landið, má ásannast, at útgerðarhavnin kemur at liggja í einum øki við nógvum vinnuligum virksemi.

### Í samsvari við andan í lógini

Vinnuhúsið heldur, at ivaleyst hava nógv viðurskifti verið vigað, tá ið valið fall á Runavík og feløgini, sum skulu reka havnina. Eitt nú hava Havnaviðurskiftini, upplandið, prísirnir o.a. gjørt seg galdandi.

– At oljufeløgini valdu eina loysn við føroyskum feløgum við róðrið, er eisini í samsvari við andan í lóginarkarminum og teimum ynskjum um føroyska vinnuliga luttøku, sum vinnan hevur lagt stóran dent á.

Vinnuhúsið sigur, at út frá einum vinnuligum sjónarmiði, kann sigast, at skuldi føroysk vinna fáa størst møguligt gagn av útgerðarhavnini, skuldi hon helst liggja høgliga fyri hjá flest møguligum virkjum.

– Hóast alt hevur fjarstøða nakað at siga og hyggja vit eftir, hvar tey 141 virkini liggja, sum eru skrásett í oljuáhugabólkinum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, er støðan henda at 71 virki eru í Suðurstreym, í Norðstreymoy eru 5 virki, í Vágum eru 9 virki, í Eysturoy eru 30 virki í Norðoyggjum eru 14 virki og í Suðuroy og í Sandoy eru tilsamans 12 virki.

Sostatt sæst, at útgerðarhavnin liggur í einum vinnuligum tyngdarpunkti í landinum, sigur Vinnuhúsið

– Fyri virki í Klaksvík liggur Runavík høgliga fyri, og fyri virkir í Vágum ella Norðurstreymoy, er ikki nógvur munur á Havnini ella Runavík. Hinvegin ger tað trupla ferðasambandið, at hjá virkjum í Suðuroy er alt uttanfyri oynna, óhøgligt.

Vinnuhúsið sigur eisini, at verður hugt eftir, hvat slag av virksemi talan er um, sæst, at nógvur verkstaðsídnaður, smiður og tílíkt er í Eysturoy. Hinvegin er tænastuvinnan nógv størsta vinnugreinin í Suðurstreymoy, sigur Vinnuhúsið.



*– Í Runavík kemur útgerðarhavnin at liggja í einum vinnuligum tyngdarpunkti. Tað er eisini neyðugt, um føroyskt vinnulív skal fáa mest øguligt gagn av henni, sigur Vinnuhúsið, sum umboðar Føroya Arbeiðsgevarafelag*

# Ongin meining at biðja Karsten um fleiri fundir

**– Vit hava lorað so nógv nú, at tað verða ikki fleiri samráðingar um Brimil, uttan so, at Fíggjarmálastýrið hevur okkurt betri at bjóða**

BRIMIL
*Áki Bertholdsen*

Tað verða ikki fleiri samráðingar ímillum Fíggjarmálastýrið og Skipara- og Navigatørfelagið um lønina hjá skiparanum og stýrimonnunum á Brimli

Hóast Løgtingið nú hevur tikið málið til viðgerðar, hevur tað annars ligið í luftini, at tað bar til hjá pørtunum at samráðast fyri at vita um tað ikki bar til at finna eina loysn, so at tingið slapp undan at leggja upp í.

Eftir at málið varð lagt fyri tingið, eydnaðist at finna semju ímillum Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálstýrið. Og tá ið tingið viðgjørdi málið, varð eisini róð framundir, at Fíggjarmálastýrið og Skipara- og Navigatørfelagið skuldi halda fram við royndunum at finna semju.

Partarnir gjørdu eisini eina roynd. Men hon miseydnaðist, tá ið Skipara- og Navigatørfelagið fór av fundinum um trý tíðina um náttina ,eftir at samráðingar høvdu verið í meiri enn sjey tímar.

Tá høvdu partarnir nærkast hvørjum ørðum, men altso ikki nóg mikið til at semja spurdist burturúr.

Eftir at tær samráðingarnar slitnaði, tók Skipara- og Navigatørfelagið av at taka tað seinasta tilboðið aftur.

Og nú tykist tað ikki sum um at fleiri royndir verða gjørdir.

Karsten Hansen, landsstýrismaður, sum førir samráðingarnar fyri Fíggjarmálastýrið, vísir á, at tað var Skipara-og Navigatørfelagið sum rýmdi av samráðingarfundinum.

Hann heldur, at tað tí má vera Skipara- og Navigatørfelagið, sum tekur stig til nýggjar samráðingar.

– Vit góvu teimum eitt tilboð, men ístaðin fyri at samráðast um tað, rýmdu teir av fundinum, sigur Karsten Hansen.

Hann sigur, at tilboðið, sum teir góvu felagnum, fevndi bæði um yvirmenninir á bæði Brimli og Tjaldrinum.

Men uppskotið, sum er lagt fyri tingið, fevnir bara um yvirmenninar á Brimli.

– So við at vraka uppskotið frá okkum, kann Skipara- og Navigatørfelagið vænta at stórur munur verður á lønini hjá skiparanum og yvirmonnunum á Tjaldrinum og á Brimli.

– Men av tí, at semja er gjørd við Maskinmeistarafelagið, sum gevur maskinmonnunum á Brimli og á Tjaldrinum eina trivaliga lønarhækking, kann tað eisini henda, at lønin hjá Maskinstjóranum á Tjaldrinum, verður hægri enn lønin hjá skiparanum og stýrimonnunum, sigur Karsten Hansen.

– Samstundis er ikki vist, at skiparin og Stýrimenninir verða tænastumenn við teimum rættindum, sum tað gevur, leggur hann afturat.

### Ongin meining

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, sigur, at tað veldst ikki um, hvat fer í tingið, men, hvat verður samtykt.

Tí vil hann ikki siga so nógv um tað enn.

Men hann heldur ikki, at sum støðan er, sær hann onga meining í, at kalla saman til fleiri fundar.

– Seinasti fundurin slitnaði, tí at tilboðið frá Fíggjarmálastýrinum var ov vánaligt. Og skulu fleiri fundir vera, skal tað vera tí, at Fíggjarmálastýrið hevur eitt betri tilboð enn tað, teir høvdu seinast.

*– Nú Skipara- og Navigatørfelagið vrakaði okkara tilboð um løn til Skipara og Stýrimenn á Brimli og Tjaldrinum, er vandi fyri, at stórur munur verður á lønunum á báðum skipnum. Tað er eisini vandi fyri, at Maskinstjórin á Tjaldrinum verður best lønti maður umborð, sigur Karsten Hansen*





FISKIVINNUTÍÐINDI

# Lágur prísur mánadagin



*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Seks skip seldu yvir telefonuppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya mánamorgunin klokkan hálvgum ellivu. Tey vóru Brestir úr Hvalba, Eysturbúgvin av Sandi, Jógvan Norði á Toftum, Magnus Heinason úr Havn, Norðleivur út Leirvís og Vesturbúgvin úr Vestmanna.

Teir seldu 281 tons fyri 2,6 milliónir krónur. Av hesum vóru 164 tons upsi, sum vórðu seld fyri 843.000 krónur. Kiloprísurin fyri upsa var kr. 5,13. 34 tons av toski vóru seld og tey fóru fyri kr. 22,34 og hetta gav kr. 762.118. Nakað væl av hýsu og kongafiski var eisini í millum. 29 tons av hýsu fóru fyri kr. 12,96 kiloið og hetta gav kr. 380.190. 27 tons av kongafiski fóru fyri kr. 10,85 og hetta gav kr. 300.904.

# Danskur trolari tikin í Noregi

Ein danskur trolari var sunnudagin seinnapartin tikin av norsku vaktartænastuni á Utsira leiðini vestur úr Rogalandi. Trolarin er undir illgruna fyri at hava veitt ólógliga í norskum sjógvi

– Vit sóu trolaran 50 míl úr landi og fóru umborð. Har staðfestu vit, at alt ikki var sum tað átti, sigur vaktarleiðarin á Forsvarskommandoen í Suðurnoreg, Joel Allan við NTB.

# Risabót til russara

Tað kann vera dýrt ikki at halda seg til reglurnar, fiskar tú í norskum sjóøki. Føroyingar hava nógv dømi um hetta og í løtuni liggur ein russiskur trolari í Tromsø. Hann er skuldsettur fyri at hava skrivað skeivt í fiskidagbøkurnar og at hava givið skeivt upp til norskar myndugleikar. Hald er lagt á veiðuna, sum er mett til 3,3 milliónir krónur og skal reiðaríið rinda kr. 100.000 í bót og sakarmálskostnað. Russiska reiðaríið í Murmansk hevur veitt trygd fyri pengunum og trolarin fer nú útaftur.

# Norðmenn veiddu 2,7 mió tons av fiski í fjør

Noreg er ein av heimsins fremstu fiskivinnutjóðum og í fjør veiddu teir 2,7 milliónir tons av fiski. Hesin hevur virði av 9,6 milliardum norskum krónur. Men prísurin er nakað fallin í mun til í fyrrárið, tá teir veiddu somu mongd, men seldu fyri 300 milliónir fleiri.

# Rækjutrolara fyri 170 milliónir

Sáttmáli er undirskrivaður um byggjan av størsta rækjutrolaranum í Norgeri. Trolarin er 71,5 metur langur, 16 metur breiður og 45 manns skulu vera við trolaranum. Trolarin verður bygdur á Slipen Mekaniske AS í Sandnessjøen og fer at kosta 170 milliónir norskar krónur, skrivar interseafood,no

# Fiskivinnuroyndir lagdar fram

Komandi hósdag verður fundur á Fiskirannsóknarstovuni, har úrslitið av verkætlanunum fyri fiskiroyndir hjá Fiskirannsóknarstonuni verða lagdar fram. Eisini verður uppskot til fiskiroyndir í ár lagt fram.Øll eru væl komin og Fiskirannsóknarstovan roknar í hvussu er við at síggja umboð fyri Løgtingsins vinnunevnd, Fiskimálastýrið, Føroya Fiskimannafelag, Meginfelag Útróðrarmanna, Føroya Reiðarafelag við undirfeløgum, Vinnuhúsið við undrifeløgum, Føroya Skipara og Navigatørfelag, Føroya Maskinmeistarafelag og fjølmiðlarnar. Fundurin verður frá klokkan 13:00- 17:00.

**je**

# Gólvuppboðssølan

**85 landaðu stívliga 54 tons á gólvuppboðsøluni fríggjadagin. Niðanfyri sæst, hvussu nógv hvør einstakur av teimum landaði**

| Syslunummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD | LUNDIN | SNELLA | 132 |
| FD 18 | SIRIÐ | SNELLA | 79 |
| FD 79 | HAVØRNIN | SNELLA | 132 |
| FD 117 | GERÐISBÁTURIN | SNELLA | 100 |
| FD 123 | RIDDARIN | SNELLA | 181 |
| FD 124 | MÚLATINDUR | SNELLA | 247 |
| FD 174 | SILVER BELLE | SNELLA | 90 |
| FD 193 | MARNA | SNELLA | 398 |
| FD 222 | GAMLI EDVARD | LÍNA | 880 |
| FD 256 | AÐNASKER | SNELLA | 94 |
| FD 329 | KARIN 3 | SNELLA | 34 |
| FD 339 | NEPTUN | SNELLA | 72 |
| FD 363 | KNÚKUR | SNELLA | 95 |
| FD 390 | ELISABETH | SNELLA | 71 |
| FD 406 | ALMA-J | SNELLA | 303 |
| FD 420 | REYNIR | SNELLA | 1.292 |
| FD 428 | MARGIT J | LÍNA | 216 |
| FD 437 | MUNKURIN 3 | SNELLA | 206 |
| FD 492 | KLETTUR | LÍNA | 271 |
| FD 530 | NORÐSØKI | LÍNA | 3.105 |
| FD 571 | DURITA | LÍNA | 383 |
| FD 618 | NORÐSTJØRNAN | SNELLA | 41 |
| FD 67 | HULDUSTEINUR | LÍNA | 1.197 |
| FD 718 | LÁGIN | SNELLA | 71 |
| FD 753 | MARIA | LÍNA | 55 |
| FD 761 | GUNNVÁ | SNELLA | 111 |
| FD 771 | KATRIN | SNELLA | 192 |
| FD 775 | LANGANES | SNELLA | 198 |
| FD 780 | BAKKAFOSSUR | SNELLA | 71 |
| FD 783 | GLÚPUR | LÍNA | 1.729 |
| FD 784 | VÓNIN | SNELLA | 170 |
| FD 842 | NICOLINA | SNELLA | 59 |
| FD 855 | LÓMUR M/B | LÍNA | 704 |
| FD1019 | HEGRIN | LÍNA | 325 |
| FD1060 | JASPIS | PARTROL | 184 |
| FD1098 | BYLGJAN | SNELLA | 85 |
| KG | SKØRIN | LÍNA | 32 |
| KG 125 | BJARNABERG | SNELLA | 100 |
| KG 127 | SKURÐAKLETTUR | LÍNA | 2.158 |
| KG 189 | VÁTIKLETTUR | LÍNA | 1.875 |
| KG 193 | FLIÐAN | SNELLA | 316 |
| KG 243 | GUDRUN | LÍNA | 983 |
| KG 279 | NORÐBERG | LÍNA | 3.198 |
| KG 288 | HELTNIN | SNELLA | 554 |
| KG 323 | TURIÐ | LÍNA | 2.531 |
| KG 423 | JASPISSTEINUR | SNELLA | 959 |
| KG 45 | RANDI | SNELLA | 1.213 |
| KG 480 | HVÍTABRÚGV | SNELLA | 110 |
| KG 507 | SØKIN | LÍNA | 1.493 |
| KG 561 | FAGRIKLETTUR | LÍNA | 443 |
| KG 587 | REYNSMÚLI | LÍNA | 2.855 |
| KG 589 | KALLANES | LÍNA | 2.553 |
| KG 640 | HANSA | SNELLA | 241 |
| KG 708 | VÁRSÓL | SNELLA | 46 |
| KG 743 | ELSA | SNELLA | 114 |
| KG 79 | NEVIÐ REYÐA | LÍNA | 1.442 |
| KG 888 | RANNVÁ | SNELLA | 235 |
| KG 92 | ØLDAN | SNELLA | 775 |
| TG 140 | JYTTE | SNELLA | 79 |
| TG 147 | HAVRENNINGUR | SNELLA | 510 |
| TG 201 | BRITT | SNELLA | 117 |
| TG 26 | MAJBRITT | SNELLA | 1.017 |
| TG 330 | VÍKINGUR | SNELLA | 355 |
| TG 349 | TRÝ DRANGUR | SNELLA | 956 |
| TG 393 | JASPIS | SNELLA | 354 |
| TG 420 | BÁRADRANGUR II | LÍNA | 522 |
| TG 471 | NÚPUR | LÍNA | 630 |
| TG 508 | MAGNHILD | SNELLA | 594 |
| TG 56 | MARIAN M. | SNELLA | 485 |
| TG 576 | SVANUR | LÍNA | 710 |
| TG 63 | TURIÐ | SNELLA | 115 |
| TG 670 | VÍKABERG | SNELLA | 1.597 |
| TG 822 | DANIA | SNELLA | 300 |
| TN 119 | PAX | SNELLA | 191 |
| TN 270 | TORGUN | SNELLA | 1.354 |
| TN 390 | TRÝ SYSTKIN | LÍNA | 704 |
| TN 422 | NÓN | SNELLA | 262 |
| TN 561 | SAFIR 4 | SNELLA | 728 |
| TN 753 | TÓRA | LÍNA | 1.566 |
| TN 805 | ANNA | SNELLA | 71 |
| TN 81 | THOMMAS | LÍNA | 1.131 |
| TN 810 | GÓÐIDRANGUR | SNELLA | 344 |
| TN 832 | HVÍTANES | SNELLA | 58 |
| TN 897 | MAJ-N | LÍNA | 551 |
| TN 919 | MORGUNROÐIN | SNELLA | 1.321 |